gult cyan magenta svart

Tí›indaskriv

Rósan vísir veg út úr myrkrinum!



Rósugudstænasta ver›ur í Christianskirkjuni í kvøld kl. 19.00

Í kvøld, 17. nov. kl. 19.00 ver›ur ein ø›rvísi gudstænasta í Christianskirkjuni. Hendan gudstænasta ber navni› Rósugudstænasta. Hetta er ein gudstænasta, sum ver›ur hildin fyri teimum, sum hava veri› útsett fyri incest og kynsliga misn‡tslu, teirra familjum og fyri teimum, sum vilja vísa sína samkenslu vi› teimum, sum hava uppliva› hetta. Samstundis gloyma vit ikki hann ella hana, sum hava framt hesa misn‡tslu. Ta› er eisini rúm fyri teimum á hesi gudstænastu!

Hví rósugudstænasta? Tí at rósan er eitt symbol uppá kærleika, uppá Jesus. Tann illger›, misn‡tarin hevur gjørt, kosta›i Guds soni lívi›, samstundis sum Jesu dey›i á krossinum veitir heilsubót. Rósan er sett mitt ímillum alla lí›ing – mitt ímillum tornir!

Vi› hesi gudstænastu vilja vit ásanna, at samfelagi› og kirkjan hava veri› tigandi. Kirkjan bo›ar umsorgan og fyrigeving, men hetta hava vit fari› alt ov lætt um, vi› tí úrsliti, at vit ikki hava tiki› offrini í álvara. Alt ov skjótt hava offrini fingi› at vita, at tey skulu læra seg at fyrigeva og gloyma ta›, sum hent er, me›an sárini blø›a ví›ari! Undir hesi gudstænastu er ta› møguleiki at fáa forbøn og at koma til Harrans ná›ibor›! Har tekur Hann og fyrigevur okkum, tí vit klára ta› ikki sjálv!

Eftir gudstænastuna ver›ur kaffi og samtala.

Ta› er felagsskapurin »KRIS í Føroyum« saman vi› prestunum í Klaksvík, sum skipa fyri hesi gudstænastu.

Ofta etur hundur ta›, hann havnar

Katrin Dahl

Aftursvar til b‡rá›sformannin

Í Sosialinum í dag, 9. nov., hevur Leivur Hansen aftursvar til eina grein hjá mær nú um dagarnar, hvar hann vi›ger ta›, sum eg seg›i, at »henda seinasta b‡rá›ssetan ikki hevur víst stabilitet«.

Eftir drúgvar umberingar kemur hann vi› ni›urstø›uni »Men fólkaflokkurin var hvørki at høgga ella stinga í, og tí gjørdu vit í Tjó›veldisflokkinum av at taka vi› tilbo›num frá hinum flokkunum, (les Sambandsflokkinum) um at kasta saman vi› teimum og solei›is fáa stabilitet aftur«.

Í sama Sosiali stendur at lesa, at Tjó›veldisflokkurin í b‡rá›num nú hevur vent summum av sínum »stabilu« samstarvsfeløgum, teimum sosialistiskt sinna›u og teimum sjálvst‡rissinna›u, baki› og hevur saman vi› Sambandsflokkinum kasta› saman aftur vi› Fólkaflokkinum fyri í skundi á eykab‡rá›sfundi at fáa eitt uppskot samtykt.

Hvar er nú stabiliteturin, Leivur?

VI‹MERKINGAR

Klaksvík er Nor›oya mó›ir

John Sigurd Joensen
Valevni á javna›arlistanum í Klaksvík

Solei›is yrkir Bernhard Brim sáli í sanginum »Kvø›a til Klaksvíkar«. Eitt brot úr sí›sta versi ljó›ar:

Tí at Klaksvík er Nor›-
oya mó›ir
hon er nor›oyinga álit
og trygd
her er menning og
nørandi gró›ur,
her í Nor›oya prú›astu
bygd

Nógv er hent í Klaksvík sí›an hesin vakri sangur var› yrktur. Her hevur sanniliga veri› menning og nørandi gró›ur, men enn er langt á mál.

Vit mugu minnast, at orsøkin til at Klaksvíkin er í menning er okkara vinnulívs-, fiski- og útró›rarmenn og tey, sum arbei›a á fiskavirkinum. Alivinnan er í stórari framgongd og gevur nógv arbei›i. Vónandi heldur framgongdin fram. Uttan hesi, sum starvast í fiskivinnuni, var ongin menning í Klaksvík.

Men av teirra ávum kunnu vit menna og skapa gó› gró›rarlíkindi í Klaksvík. Annars haldi eg, at Klaksvíkin hevur gott og ágr‡ti› fólk innan allar stættir. Ta› skal ongin ver›a gloymdur, sum ger eitt gott arbei›i, hvør á sínum øki.

Eg nevndi at byrja vi›, at enn er langt á mál. Tí er ta› ógvuliga umrá›andi til hetta b‡rá›svali› at velja teir røttu persónarnar í b‡rá›i›. Vit vilja gró›ur og meiri menning í Klaksvík. Vís mær álit, eg havi álit á tær. Gott val. Vel rætt!

Trivna›urin upp – skattaprosenti› ni›ur

Birgir Mohr
Sandur



Máli›, at hava gó›an trivna› í kommununi samstundis sum fari› ver›ur undir mi›víst at lækka skattaprosenti› so lí›andi, kann røkkast, men høvu›sfyritreytin er, at bygdarrá›i› framhaldandi hevur sum fremsta mál at ni›urgjalda skuldina hjá Sands kommunu. HETTA ER NEY‹UGT!

Okkara kommuna var ein av teimum kommununum, sum var har›ast rakt av samfelagskrepuni í nítiárunum. Hvussu hart kreppan rakti her l‡sist best vi› tí sannroynd, at skattainntøkan var› nærum hálvera›, hóast skattaprosenti› var og er í toppi. Hetta var ikki minst orsaka› av, at størsta arbei›splássi› her – flakavirki› – var stongt í fleiri ár.

Hetta hendi alt eftir at kommunan líka sí›an 1970 hev›i framt íløgur yvir f‡ra umfør vi› byggjan og útbyggjan av Sands havn fyri meira enn 100 mill. kr. tilsamans, umframt a›rar íløgur.

Sands havn er í dag størsta aktivi› á Sandi, ein stór og trygg havn, sum er fyritreytin fyri fiskavirkinum og øllum hinum aktivitetinum har úti.

Undir og eftir búskaparkreppuna hevur ta› veri› ney›ugt at hildi› tørn og skáksiglt fíggjarliga. Skuldin var› umfíggja› saman vi› ø›rum kommunum og Føroya Løgting hevur nú fimm ár seinni vi›lóg vi›tiki› at sanera part av skuld hjá nógvum kommunum, so allar koma at skylda minni enn tríggjar skattaálíkningar. Eisini er nú fingin til vega n‡ggj fimm ára umfígging av restskuldini. Hetta seinasta er ein fyritreyt fyri landspolitikkin.

Samstundis er skattainntøkan aftur vaksin, so tí›in er nú komin til at normalisera vi›urskiftini aftur, ta› vil siga at lækka skattaprosenti› so hvørt kommunuskuldin ver›ur ni›urgoldin vi› umlei› 10% árliga, fyri til endans at røkka málinum: kommunuskuld hægst ein álíkning. Fyrst tá kemur Sands kommuna í trygga legu og kann virka optimalt.

Fyri at náa hesum máli er ney›ugt, at tey, sum ver›a vald inn í bygdarrá›i› 21. november, gera sær greitt, at hvør króna má vendast, og ni›urgjalding av skuld framvegis má vera lagt í fastar rammur og fasthildi›.

Bert harvi› kunnu vit lækka skattaprosenti› og ni›urseta kommunuskattin, sum rakar allar inntøkur eins hart og harvi› tey lágløntu sera hart. Lægri kommunuskattur er ein partur av trivna›inum, og ein fyritreyt.

Gott val!

Ein heilsan til sandingar

Sólvit Simonsen
Valevni til Sands bygdarrá›

Eg havi lati› meg stilla› upp til kommunuval komandi setu.

Ikki kann lovast gull og grønar skógir. Sands kommuna er skuldarbundin og má ta› fyrsta ver›a tey komandi árini at fáa goldi› skuldina ni›ur, so gongd fæst á aftur. Annars er at vóna, at arbei›sgongdin heldur fram bæ›i á sjógv og landi, so skal ta› nokk ikki ver›a nakar trupulleiki at fáa ta› at bera til.

Tá i› eg havi lati› meg stilla upp, er ta› so avgjørt ikki av nakrari egininteressu, men eg vil fegin hava ávirkan á at gera ta› besta fyri bygdina hjá okkum, solei›is at ta›, sum møguleiki er at fáa á skafti›, skal sjálvandi gerast fyri ta› fólk, sum her búleikast, yngri sum eldri.

Um heystartí› tá náttin s‡gur yvir landi›
Og vetur nærkast brimi› sæst vi› strond
Ei gloyma vit tá bygdina á Sandi
Sjálvt um vit leita burt í onnur lond
Tá vári› sprettur smálomb byrja spæla
Og náttúran hon ver›ur øll so fín
Hvat sigur tá tann summartí›in sæla
Á Sandsbygd kæra er og ver›ur mín

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 17. november til hósdagin 23. november

Keld Heick hittir Creamy-genturnar

Okkara kokkar

Sjónveik undir sjóneyku

Ingun í Skrivarastovu hevur gjørt eina sending kallað: »Tað kann vera torført...at síggja« Í sendingini verður hugt nærri at, hvussu lívið hjá blindum og sjónveikum er.

Prátað verður við Tórunn Sumberg, sum gjørdist sjónveik eftir at hava havt sukursjúku í mong ár. Hon heldur ikki, at tað er nøkur orsøk til at taka synd í blindum fólkum.

Í dag lærir Tórunn at veva, og hennara gerandisdagur er ikki stórt øðrvísi enn hjá vanligum fólki, sum hava sjónina.

John Haraldsen var bara seks ára gamal, tá hann misti sjónina. Hann greiðir frá, hvussu hart tað var ta fyrstu tíðina aftaná, at sjónin var burtur. Tað var torført at læra at ganga við blindastavi, tí hann føldi, at øll gløddu at sær.

Hann heldur ikki, at fólk skulu uppfata blind sum marsbúgvar, tí innan eru tey eins og áðrenn, tey mistu sjónina.

Sendingin verður at síggja í SvF sunnukvøldið klokkan 20.

Alt gott úr havinum – men hvussu leingi?

Annika Sølvará ummælir

Mánakvøldið var matsendingin Okkara Kokkar, har Gudmundur og aðrir kavaðu eftir øðum og igulkerum. Stuttligt at fylgja matinum úr náttúruni næstan niður í búkin. Fantastiskar myndir av botninum, við tónleiki, so tað var ein fragd at síggja. Tíverri stóð brotið í andsøgn til ta spillu, sum er komin í hesa frálíku sending. Maturin er sum oftast áhugaverdur, mánakvøldið ein fragd, um ein hevur hug til skeljamat. Men - tað er beinleiðis pínligt at síggja allar lýsingarnar, sum eru kroystar inn.

Mánakvøldið var tað fyri gummibátar, kavaradraktir, flutningsfeløg osf. Undanfarnar sendingar hava aðrir sponsorar verið trýstir fram á skíggjan. Eg haldi, at ein útbúgvin kokkur, sum heldur fær sær eina pakkasós, tí tað er lætt, ella ein "PM maxibúff" heldur enn ein hakkibúff úr nýmalnum oksakjøti, átti at havt ringan smakk í munninum og skammast. Í fjølmiðlunum varð tað talað at hesum skjúldu og beinleiðis lýsingunum, og eg meini at boðini vóru, at sendingarnar skuldu klippast av nýggjum. Har er eftir mínum tykki nógv eftir, sum átti at verðið klipt burtur. Tað er betri, at tær verða tiknar av skránni, um tað ikki ber til at sleppa undan øllum lýsingunum.

Ongir pálmar í væntu

Næsta sendingin mánakvøldið við havinum sum evni var Innskot. Gesturin var Bogi Hansen, havfrøðingur, sum júst hevur givið út bókina Havið. Hann er bæði áhugaverdur og greiður, men boðskapurin er kanska heldur syrgiligur. Stórar veðurlagsbroytingar eru uttan iva fyri framman, men tað fer neyvan at gera Føroyar til eitt tropuparadís. Sannlíkt er, at tað verður kaldari næstu árini. Eitt annað evni, teir komu inn á var pástandurin um, at vit hava heimsins reinasta hav. So er ikki sambært Boga Hansen, á øllum økjum í øllum førum, enn minni er vit serliga røsk at verja um havið. Hetta er annars nakað vit plaga at gera vart við úti í heimi, serliga tá vit selja fisk. Hetta kann kanska forsvarast enn, tí tey vit samanbera okkum við eru verri fyri, men spurningurin er, hvussu leingi. Í sendingini var havið samanborið við eitt skáp, sum goymir nógv ting. Mær kunnugt plagar tað, vit koyra inn í skápini, fyrr ella seinni at bólta útaftur.

Spurdur um týdningin av at granska í føroyska havinum, svaraði Bogi Hansen, at havið fyri føroyingar er ein týðandi partur av samleikanum, eins og søga og mál eru tað. Umframt hetta er havið kring Føroyar so serligt, at útlendskir granskarar eisini leita higar í kanningarørindum. Hesin áhugi minkar neyvan, so hvørt veðurlagsbroytingarnar fara at gera um seg.

Dúgvukvæði

Eitt evni í tíðindunum hesa vikuna, sum fellur væl við evnið hav, var óhappið hjá Dúgvuni í innsiglingini í Leirvík. Hóast Strandferðslustjórin, tekniski stjórin og sjálvur landsstýrismaðurin hava ávarað um, hvussu illa tað kann ganga, um eitt skip gongur fyri, so er tað helst ikki fyrr enn nú at veruleikin gongur upp fyri teimum flestu. Dúgvan tók botn, og lívsæðrin til Norðoyggjar varð kvett. Øll vóru samd um, at okkurt mátti gerast í stundini. Ritan, Barskor ella Smyril máttu avloysa. Norrøna kundi kanska leigast til Suðuroyar. Søgan menti seg, antin sum ein krimi ella skemtisøga, alt eftir, hvar ein býr. Fyri at Norðoyggjar ikki skuldu steðga heilt upp, noyddist Suðuroyggin at leggjast hálvlamin eisini. Hvussu leingi hetta kann ganga, veit eg ikki, men tað er givið, at Strandferðslan og Vinnumálastýrið mugu arbeiða skjótt. Undir øllum umstøðum er hetta vatn á mylluna hjá teimum, sum ynskja ein undirsjóvartunnil til Klaksvíkar og ein nýggjan Smyril til Suðuroyar. Og inntil skil kemur á, noyðist Strandferðslan at nýta í túsundavís av krónum uppá lýsingar í ÚF og svara nógvum uppringingum frá fólki, sum ikki sleppa har, tey ætla sær.

Úr suðurhøvum

Flestu stjørnunar hesa vikuna vil eg geva Duritu Holm og manning fyri frálíku sendingarnar frá ferðini um bláu gongustjørnuna. Tá sendingin hjá TV2 varð send fyri góðum ári síðani, mungaði eg eftir meira, og tíbetur er nógv gott tilfar at taka av. Myndinar eru frálíkar, og sendingarnar eru væl kliptar. Tey hava givið sær betri tíð við sjónvarpstilfarinum enn bókini, og tað er gott. Samstundis sum vit síggja myndir frá ferðini, lýsing av ymsum mentanum og av sjólívinum, kenna vit eisini stemningin, gleðina við at ferðast og verða frí. Sjálv frásøgnin er ein passalig blanding av almennum viðmerkingum og privatum upplivingum. Gott, at ævintýrarar eru til enn. Eg gleði meg til restina av sendingunum.